# Í eini møguligari oljutíð mugu bæði tað almenna og vinnulívið seta sær strangari krøv

*– Trupult er at halda seg aftur at fara eftir gulli, tá tað tykist vera beint fyri durunum, men at fara ófyrireikaður, kann ofta hava við sær, at tú fært nógv minni burtur úr enn tú kanska annars kundi – enntá kanst tú sita eftir við ongum. Skulu vit fáa sum frægast burtur úr eini møguligari oljutíð, er neyðugt, at vit krevja lut í øllum førleikamennandi og førleikakrevjandi tænastum frá fyrsta degi*

**Miele**
Við sinum dygdargóðu vaskimaskinum hugsar Miele eisini um komandi ættarliðið
Eyðkent fyri Miele.
Tvey hitakam, í stáðin fyri eitt. Hárav longri ivlið.
Dettir fyggara víl tegnast.
Jakup á Dul
á Hálsi - Tlf. 14949

Hetta m.a. segði Kjartan Kristiansen, menningarstjóri, í fyrilestri á oljuráðstevnuni í Læraraskúlahøllini seinasta vikuskiftis.

Kjartan Kristiansen visti á møguleikar hjá føroyingum í oljuvinnuni, hvat føroyingar kunnu fáa burturúr, nam við vinnuligt og búskaparligt árin, góðsku o.s.fr.

Hann segði:

**Hvørjir møguleikar eru fyri føroyingum í oljuvinnuni/ Hvat kunnu føroyingar fáa burtur úr oljuvinnuni?**

Stutt kann spurningurin svarast soleiðis, at uttan so, at tað almenna og vinnulívið brovta kós og í dyggum samstarvi beinanvegin taka eitt málrættað ódnartak og seta greitt út í kortið, hvørji vinnuligu mál okkara eiga at verða og hvussu vit skulu náa teimum, so verða smáir møguleikar fyri føroyingum í oljuvinnuni, og at føroyingar fara at fáa nevnivert gagn burtur úr møguligari oljuvinnu um okkara leiðir.

Aftanfyri hetta eitt sindur ógvusligt uppáhald liggja hesi høvuðssjónarmið:

1. Skulu føroyskar fyritøkur fáa langtíðar gagn av møguligari oljuvinnu, so mugu tær koma at virka í oljuvinnu við tí málsetningi at gerast óheftar av oljuútvinning um okkara leiðir. Tí mugu umstøðurnar beinanvegin lagast soleiðis til, at føroyskar fyritøkur eru førar fyri at koma upp í møguliga oljuvinnu longu áðrenn avgerð um og forkanningar v.m. byrja.
2. Oljuvinna treytar bæregstu góðsku – í orðins víðastu merking – í øllum veitingum av vørum og tænastum. Kunnu føroyskar fyritøkur ikki líva upp til hetta krav, skulu tær ikki bjóða til at virka innan oljuvinnu. Kann hetta krav harafturímóti lúkast, hava føroyskar fyritøkur eisini allar møguleikar uttan fyri oljuútvinning um okkara leiðir.

**Vinnuligt og búskaparligt árin av oljuvinnu um okkara leiðir eiga at verða tikin við av álvara.**

Í arbeiðssetningunum hjá Ráðleggingarnevndini verður dentur ikki lagdur á vinnuligu og búskaparligu árinini av møguligari oljuvinnu í Føroyum. Bert er nevndin biðin um at hjálpa til við at gera eitt verklag (strategi) til **umsitingar av tilfeinginum í undirgrundini.** Ráðleggingarnevndin hevur tó fingið evnað til passiva lýsing um, hvussu kann ein møguligt oljuvinna hugsast at fara at ávirka føroyska samfelagsbúskapin.

Heldur ikki verður serstakt lagdur so stórur dentur á vinnuligu og samfelagsbúskaparligu árinini. Í løgtingssamtyktini verður einans sagt: »Haraftrat eigur greiða at fáast á, hvussu størst møguligt fyrilit kann havast fyri fiskivinnu og umhvørvi, og hvussu arbeiðsmøguleikar, vinnu- og samfelagsáhugamál verða tryggjað á besta hátt, verður talan um leiting eftir og útvinning av kolvetnum á føroyskum øki.« Og »løgtingið vónar, at hetta fer at vera til gagns fyri landsins búskap og fer at bøta um arbeiðsmøguleikar landsins.«

Í løgtingslógini, § 3, verður einans sagt, at »landsstýrið kann áseta treytir fyri einum kanningarloyvi, herundir um rindan av avgjaldi og ágávu og frágreiðing um gongdina í kanningum og um urslitini og um trúnað.«

Frammanfyristandandi dømi prógva, at dentur enn ikki er lagdur á at tryggja, at tann oljuvinna, ið nú er komin økkum so nær, kann fáa positiv vinnulig og samfelagsbúskaparlig árin í Føroyum og fyri føroyingar. Men ørð einsamøll gera tað ikki. Júst tá tað snýr seg um at tryggja positiv vinnulig og samfelagsbúskaparlig árin gerst hetta ikki við orðum. Struktururin í føroyskum iðnaði og tænastuvirksemi og fakligi og figgjarligi veikleikin eru sterkar fordingar fyri føroyskan luttøku í oljuvinnuni. Hjá vinnuni og tí almenna at forláta sær uppá, at møguleikarnir í oljuvinnuni vilja gera, at nakað – og tað rætta – hendir, er tryggastu vegur til, at einki positivt hendir. Vit kenna alt ov væl til misnøgd hjá útlendskum fyritøkum av, at føroyingar bjóða seg fram og biðja um áhuga, og so ikki láta frætta aftur frá sær, tá tær hava skilt, at tær einki megna. Í støðu okkara við tvørrandi kapitalsterkum fyritøkum við góðari leiðslu, má ein felags strategi leggjast, so kann tryggja eina stigvísa og miðvísa uppbygging av vinnuligari luttøku. Hetta gerst einans við einum kravmiklum og áhaldandi arbeiði, har tað almenna og vinnulívið arbeiða sera dygt saman.

Neyðugt er, at almenna fyrisitingin, ið tekur sær av hesum málsøki, fær umstøður og serkunnleika til at taka henda táttin upp í álvara. Menningarstovan er sostatt samd við støra meirlutan í marknaðarnevndini, tá hesin í áliti sínum m.a. sigur:

»Tað er sera umráðandi, at stig longu nú verða tikin til, at føroysk vinnulig áhugamál verða sett í tremstu rað. Bæði í verandi ráevnisvinnu í fremmandum sjógvi, og síðan í føroyskum. Tað er umráðandi, at føroyskar vørur, tænasta, handverk, handil, samskifti, havnaleg og manningar eru í fremstu rað, longu nú farið verður undir seinniskt kanningarvirksemi.«

»Visandi m.a. til samsvarandi norsk krøv verður tað eitt náttúrligt krav frá føroyskari síðu, at tey feleg, ið fáa vinnulig rættindi, skulu leggja hesi til rættis soleiðis, at føroyskur iðnaður, verkfrøði og gransking koma í fremstu rað skjótast gjørligt, og soleiðis at neyðugt grundarlag verður skapt fyri kappingarførni framefter.« – »Mælt verður til, at tann almenna fyrisitingin, sum tekur seg upp, fer at virka í neyvum samstarvi við vinnulívið, og at störur dentur verður lagdur á at fáa ta frægastu serfrøðina vit vara av at skipa fyri á hesum øki.«

**Hvat føroyingar vinnuliga og samfelagsbúskaparliga kunnu fáa burtur úr oljuvinnu velst herumframt um góðsku í øllum veitingum**

Frammanfyrinevndu viðurskifti tala greitt fyri, at tað føroyingar kunnu fáa burtur úr einari møguligari oljuvinnu má fáast frá byrjan við fremst at veita tænastur. Hesar tænastur krevja duguleika og servitan, men geva so sannliga eisini duguleika og servitan, um vit megna at liva upp til tey krøv, ið hesar tænastur krevja. Hetta merkir, at tað er serliga í forkanningartíðini og leitingarboringartíðini v.m., at føroyingar skulu tryggja sær møguleikan at vera uppi í tí at veita tænastur. Ber til at sleppa upp í part fer tað at krevja støðuga uppbygging av vitan, og tí skulu vit ikki rokna við, at møguligur vinningur fer at kunna verða nýttur til konsum ella afturgjalding av lánum. Heldur fer allur vinningurin til ílegur í dugnaligari fólk og fyritøkur.

Í frágreiðingini verður vist á nøkur almenn aðalkrøv, ið ein slík luttøka setir. Av teimum krøvunum, sum í hesum sambandi kunnu vera mett av týdningi, eru havnaviðurskifti, útbygving og tøk arbeiðsmegi, góður infrastrukturur, góðar tænastuveitingar og gott samband við umheimin. Tað eru tíverri ikki øll hesi krøv, ið vit luka nóg dygt og tryggt í dag.

Havnaviðurskiftini mugu metast kappingarfør, í hvussu so er í teimum báðum fyrstu fasunum, men ikki er óhugsandi, at skal nóg dygg tænasta kunna veitast eisini her, so kunnu krøv um serligar ábøtur koma á tal á teimum havnum, ið vilja verða náttúrligar at velja.

Viðv. arbeiðsmegini: Grundutbygvingin er góð og eftir altjóða mæti er fitt av vælutbúnum fólki. Ein störur partur av fólkinum starvast á sjónum, og føroyingar eru vanir at arbeiða í útlendskari tænastu. Verður nevðugt við eftirfarandi bygvingum, er einki at ivast í, at føroyska arbeiðsmegin er skjót at taka eftir. Men neyðugt er kanska at skovta uppí, at tá tað snýr seg um hjá økkum sjálvum at skipa fyri tænastum, ið krevja hesa arbeiðsmegi, so eru rosyndirnar higartil vánaligar, um hetta so kemst av vantandi hugi og vilja til samstarv ella vantandi leiðslu. Vit hava eisini alt ov nógv dømi um vantandi góðsku í okkara verki og um hugburðin »tað er ikki so farligt.«

Hvat dygdini í øðrum tænastuveitingum viðvíkir, eitt nú bankum, tryggingum, grannskoðarum og sakførarum o.a.m. er okkara fatan tann, at á hesum økjum stendur als ikki so væl til. Tað er ikki fyrr enn seinasta árið, at nakar av hesum tænastuvinnugreinum eru um at fáa fakligt mennandi samstarv við útlendskar fyritøkur av samaslag, nú vit so smátt eru byrjað at fáa onkrar nýmótans lógir innførdar.

Vit halda heldur ikki, at okkara samband við útheimin er nóg dygt og tryggt til at luka tey krøv, ið fara at verða sett. Hvat telesamskiftunum viðvíkir, so skuldu hesi viðurskifti verið rættiliga kappingarfør, serliga tá nýggi hjoðleðarakaðalin kemur í nýtslu. Men tá snýr seg um flog- og skipasamband, má vandin fyri, at verandi tænasta verður skerd munandi, haldast alvarsliga støruri. Vit halda tað vera av størsta týdningi, at privat og almenn áhugamál skjótast ganga saman fyri at tryggja, at flog- og skipasambandið verður tryggjað á høgum stóði. Hetta er ein avgerandi fyritreyt fyri møguleikunum hjá samfelagnum og harvið eisini fyri, at vit kunnu fáa nakað burtur úr oljuvinnuni.

**Føroyskar fyritøkur mugu undir miðvist og krevjandi arbeiði, um tær skulu fáa nakran kjans í oljuvinnu**

Nógv størri trupulleikin enn tey meira almennu krøvini eru tey krøv um góðsku í viðari merking, ið føroysk virki og vinnulív av fullum huga mugu ganga undir og lúka. Eymið er ov vítt at fara um her, men eg noyðist kortinn at taka tvær táttir upp.

**Góðsking**

Virki, ið ætla sær inn í oljuvinnuna sum leverandørar av vørum ella tænastum, eiga at leggja seg eftir góðskustýring.

Oljuvinnan setir stór krøv til sínar leverandørar hvat góðskustýring viðvíkir, og føroysk virki kunnu ikki rokna við at sleppa upp í part, um tey ikki lúka krøvini. Tað er heldur ikki ókent, at kesparar bruka tekniskar umberingar fyri at sleppa undan at lúka krøv um kompensatiónsordrar í kontraktum.

Av tí at tað tekur langa tíð at byggja góðskustýringsskipanir upp, eiga virkini at taka fyrsta stigið beinanvegin. Um virkini seta sær sum minsta mál at fáa góðskustýringina upp á eitt somikið høgt stóði, at tey bert eru ísj.-1 ár frá eini ISO 9000 sertifisering, skuldi útgangsstóðið verið í lagi.

Hetta stigið hevði verið tilstóran fyrimun fyri virkini í aðrar mátar.

**Netverkssamstarv**

Tað er synd at siga, at strukturin í vinnulívinum yvirhøvur gevi fortreytirnar fyri veitingum til oljuvinnuna serliga góðar. Vit hava nógv sma virki sum bert kunnu veita tænastur innan eitt avmarkað øki, og sjáldan tey størru virkini eru at rokna sum sma í ti høpi sum altióða oljuvinnan virkar í. Afturat hesum kemur, at nógv virki eru figgjarliga so veik, at tey ikki hava møguleika fyri at menna seg sjálvi undir teimum vinniligu umstøðunum, vit hava í dag.

Hetta kundi verið bøtt um, um virkini høvdu nú ágidi seg eftir samstarvi til í netverkum.

Netverkssamstarv eru strategisk samstarv um framleiðslu, marknaðarføring e.a., har ídein er at spara útreiðslur við arbeiðsbesti ella felags arbeiði, og at partarnir úteftir virka sum ein størri eind innanfyri samstarvsøkið og kunna bjóða tryggja meira fullfiggjaða tænastu.

Í einstøkum førum kundu eisini beinleiðis samanleggingar verið gjørdar. Hetta kundi kanska serliga verið fyrimunur, har virkini eru figgjarliga veik, men tó hava góða ekspertisu at taka við inn í eitt samstarv. Ein møguligt samanlegging kundi eisini betri tryggjað útgangsstóðið í samráðingum við vignarar um sanering.

**Hvat kunnu vit so gera?/ Niðurstøða**

Veturin 1960/61 hevði eg høvi at vitja í skergarðinum á vesturlandinum í Hordalandi hjá Vindenes, norskum fiskiskipara og reiðara, eisini kendur í Føroyum. Á staðnum stóðu leivdirnar av størum sildaverksmiðjum og rustaðu. Summir partar vóru tiknir av verksmiðjunum, men yvirhøvur stóðu leivdirnar og bryggjur og gapaðu tómar. Sildin var tá farin norður um Florø og otaði seg tívert ár longur norðureftir. Virksemið um Vindenes-leiðina av sildini var steðgað, men nøkur tá skip høvdu lutteku enn í sildafiskiskapinum.

Tá eg nevni hesa vitjan, so kemst tað av, at á mangan hátt minnir oljuvinna meg á sildafiskiskapin við norsku strendurnar í 50- og 60-árunum. Eitt svikaligt tilfeingi bæði hvat viðvíkir nógd, prísi, drúgføri og møguleikum fyri at renta og halda dugnum við líka.

Trupult er at halda seg aftur at fara eftir gulli, tá olja ella sild – tá hon tykist vera beint fyri durunum, men at fara ófyrireikaður kann aftur hava við sær, at tú fært nógv minni burtur úr, enn tú kanska annars kundi, enntá kanst tú sita eftir við ongum. Eg skal ikki duga at meta um, um vit á øðrum økjum eru nóg væl fyrireikað, men sæð eru tó tvíssmi so er ikki fyrireikaður, hvat trygging av positivum vinnuligum og samfelagsbúskaparligum árini viðvíkir.

Skulu vit fáa sum frægast burtur úr og kunna sum frægast burtur úr eitnari møguligari oljutíð, so er neyðugt, at vit kunnu lova økkum at krevja lut í øllum førleikamennandi og førleikakrevjandi tænastum frá fyrsta degi. Førleikin kann seta annað virksemi í gongd og kann viðvíkja um økkara tænsut á mongum øðrum økjum enn just innan oljuvinnu.

Fortreytir fyri at vit kunnu lova økkum at seta slík krøv er, at tað almenna og vinnulívið fyrst seta sær sjálvum og dyggum samstarvi sínámillum, eitt strangari krøv um mið og fortreytir fyri vinnuligum og samfelagsbúskaparligum árini og leggja felags strategi fyri hesum. Hetta treytar aftur, at almenna fyrisitingin, ið tekur sær av hesum málsøki, beinanvegin fær umstøður og serkunnleika til at taka hendu táttin upp í álvara – og ger tað.



**Kjartan Kristiansen, menningarstjóri: – Førleiki kann seta annað virksemi í gongd og kann viðka um økkara tænsut á mongum øðrum økjum enn just innan oljuvinnuna**